Skemt




MYND: ÁLVUR HARALDSEN

# Vilt tú hjálpa?

Í hurðini í Miðlahúsinum hekk nú um dagarnar hendan plakatin. Spurningurin til fólk er: Vilt tú hjálpa. Tað kundi verið skjótt at misskilt, hvør tað er, sum biður um hjálp, men sum vit hava skilt, er tað ikki Miðlahúsið, men Reyði Krossur.

## Stórur lygnari

Ein prestur kemur fram við einum flokki av drengjum, sum sita rundan um ein hund:

– Hvat gera tit við hundin, spyr presturin

– Vit kappast um hann. Tann, sum klárar at fortelja størstu lygnina, hevur vunnið hundin, svarar ein av dreingjunum.

– Jamen, dreingir, tað mugu tit ikki. Tá eg var ungur, leyg eg ongantíð.

– Hann skal hava hundin, sigur drongurin við hinar.



## Hetta fer at taka eina løtu

Tað er vanliga stórarbeiði at mála eitt skip, men tað eru ikki øll, sum stúra fyri eini slíkari avbjóðing. Her er ein maður farin í holt við at mála skip, sum er á beding, og hóast pensilin kann tykjast lítil, so ber tað til at mála skipið – men tað tekur nokk eina løtu.

## Í RANGASTRÚPAN

**Ein andsøgn, sum vil nakað**
109 ár men nøgd og glað
*Portal.fo*

**Rullandi eftir hallargólvinum**
Hondbólturin á rull aftur
*Dimmalætting*

**Skoyta ikki um brúktar seðlar**
Eik má bjargast við nýggjum pengum
*Portal.fo*

**Hálvtannað í part?**
B71 og FC Suðuroy býttu stigini
*Dimmalætting*

**Man tað passa?**
Chelsea tapti sín fyrsta dyst
*Dimmalætting.*

**Hvat grenja tit so um?**
Eik kann ikki fara á heysin
*Portal.fo*

**Tú hevði gjørt tað sama!**
Tjóðveldi noktar at velja millum pest og kolera
*Portal.fo*

**Innbakað mús?**
Ongland: Fann deyða mús í breyði
*Portal.fo*

**So er hann vandamikil, meðni!**
Húkurin fellir pelar í rundkoyring
*Portal.fo*

**Vilja teir hava hann?**
Løgmaður: Ikki útilokað, at staturin fær Eik banka
*Kringvarpið*

## UMAFTURAFTURUM
## HØGNI DJURHUUS



# Gásarfuglur í flokki

Tey hildu, at Janus Mohr var undarligur, tá hann so ofta tosaði um gæs í óteljandi sendingum sínum í Útvarpinum kl.13.40 sunnudagar.

Hvussu hann tosaði við gæsnar, hann hitti á sínum mongu gonguferðum. Har vóru tær, sum ikki skiltu hansara gásamál, grágæsnar, sum vóru komnar langa leið úr øðrum londum og tí høvdu eitt fremmant mál.

Nei, einki er tað undarligt. Tí gásin er ein ótrúliga áhugaverdur og forkunnugur fuglur at eygleiða og tosa við.

Tvær ferðir um dagin gangi eg fram við einum stykki, har sum gæs eru. Nú er har eru 16 gæs, fýra fyri seg, 11 fyri seg og ein fyri seg. Og tær eru fyri seg.

Hendan eina virkar at vera gomul. Hon er tann største har á stykkinum, altíð einsamøll, og hon gongur ikki so nógv sum hinar.

Tær fýra hava verið har longst, tvær eru komnar úr egginum her, og hinar 11 eru fluttar higar tíðliga í summar.

Tær eru altíð saman í flokkinum, fýra, 11 og so ein, um til ber kalla eina gás ein gásaflokk (hvussu var tað Benny Andersen so filosofisktlogiskt segði: "fuglene flyver i flok, når de er mange nok").

Hóast tær í mínum eygum líkjast allar, gæsnar, fara tær ongantíð við ein øðrum flokki enn sínum. Tær vita, hvar teirra pláss er. Gásin hevur floksaga. Eg tori at póstanda, hóast tað er ikki vísindaliga prógvað, at ongantíð er meira enn í mesta ein metur millum gæsnar í einum flokki. Samanhald, sum vert er at tosa og skriva um.

Steggin í flokkinum hjá teimum fýra, ja, hann er líka illsintur enn sum hann var í vár, meðan hann bíðaði eftir ungunum. Nærkast hin flokkurin hansara, so fer hann spelandi fýsandi avstað við nevinum sum vákn.

Well, vit fólk eru eisini í flokkum. Nøkur einsamøll í sínum flokki. Og eingin skal vága sær at nálgast uppi í okkara flokki, tí hann er sjálvandi tann besti.

Í hesum døgum, tá eg í morgunmyrkrinum gangi fram við teimum trimum gásaflokkunum, hugsi eg um syndarligu støðuna, sum hálovaða demokratiið í Svøríki er komið í eftir valið herfyri.

Fimmkommasjey prosent av fólkinum, nógv teirra vónsviknir og ørkymlaðir sosialdemokratar, segði Mona Sahlin í frálíku norsku/svensku sjónvarpssendingini "Skavlan" síðsta fríggjakvøld, valdu Svøríkisdemokratarnar.

Valdu Svøríkisdemokratarnar, sum øll hini ávaraðu móti í valstríðnum. Eingin vildi ella vil nálgast uppi í teimum. Máti skal vera við fólkaræðinum.

Fólkið má gjarna velja, brúka sín demokratiska rætt. Tað skuldi bara ikki velja Svøríkisdemokratarnar.

Svøríkisdemokratarnir spretta úr rasismu og nasismu. Men flokkurin fekk 20 fólk í ríkisdagin. Men tí flokkinum vil eingin av hinum vita av. Nærkast hann teimum, koma steggjarnir eftir teimum við váknunum fremst.

Hjá okkum í Føroyum er ómakaleyst at finnast at slíkum flokkum, tað er politiskum flokkum, tí her eru ikki flóttafólk og innflytarar.

Høvdu vit upp á seg líka nógv flóttafólk sum tey hava í Svøríki, høvdu vit eisini Føroyademokratar. Í Føroyum eru ikki færri rasistar enn í øðrum londum.

Stuttligt annars, hvussu væl slíkir flokkar, sum bjóða veljarunum rasismu og aðrar dubiøsar ismur, duga at finna sær eitt navn við orðunum fólk og demokrati, ja, enntá sosialisma.

Á tingtrøðni í Stokkhólmi ganga gásaflokkarnir og ansa hvør eftir øðrum.

Gamaní er demokratiið tolerant. Men á einum standardgásamáli, takk.

Sum onkur so vísiliga segði: fólkaræði er meirilutaeinræði.

Og Eik fær eina fyrstahjálparskjáttu frá Tryggingarfelagnum.